# Eingin trygd aftan á klokkan fýra

*– Gongur eitt tól fyri aftaná klokkan fýra um dagin, í vikuskiftinum, ella ein heilidag, er ongin at gera tey aftur. Í ringasta føri kann hetta kosta mannalív, sigur Bogi Djurhuus, yvirlækni*



ÁKI BERTHOLDSEN

–Tær sparingar, sum nú verða gjørdar á Suðuroyar Sjúkrahúsi, kunnu í ringasta føri kosta mannalív.

Bogi Djurhuus, yvirlækni á Suðuroyar Sjúkrahúsi, sigur, at nú tað er avgjørt at siga einum teknikara á sjúkrahúsinum upp, missa tey ein stóran part av trygdini tey hava.

– Nú teknikarin verður sagdur upp, fer tað ikki longur at bera til at hava vaktarskipan á teknisku deild.

–Og tað vil aftur siga, at , at aftaná vanliga arbeiðstíð, er ongin teknikari á vakt á sjúkrahúsinum.

– Sostatt hava vit onga trygdarskipan á sjúkrahúsinum aftaná klokkan fýra um dagin.

Bogi Djurhuus sigur, at hetta er ein ómetaliga keðilig støða.

Tí hetta ber í sær, at gongur eitt tól fyri aftaná klokkan fýra um dagin, í vikuskiftunum, ella ein heilidag, er ongin at gera tað aftur.

Hann skoytir uppí, at á sjúkrahúsinum eru nógv ymisk tól. Og í allarflestu førum er talan framkomin tól, sum tað krevst servitan til at arbeiða uppá, eitt nú røntgentól, narkosutól, laboratoriutgerð, elektroniska samskiftið við landssjúkrahúsi í sambandi við hjartasjúklingar o.s.fr..

Yvirlæknin sigur, at vanliga virkar alt, sum tað skal og sum oftast bilar tað einki, um umvælingar bíða til næsta, vanliga arbeiðsdag.

– Men tað er, tá ið tær álvarsamu støðurnar taka seg upp, at alt *skal* virka, sum tað eigur.

Og hann spyr, hvør avleiðingin verður um ein álvarslig støða tekur seg upp, uttanfyri vanliga arbeiðstíð, og eitt tól gongur fyri.

– Tá fáa vit onki gjørt, og tað kann verða ein galin endi.

Og vil heilt illa til, kann tað kosta mannalív, leggur hann afturat.

**Slept upp á fjall**

Bogi Djurhuus harmast eisini um, at tað nú er avgjørt at leggja tað ambulantu fysioterapiina niður.

Hetta rakar ikki bara tey, sum eru sjúk, ella hava brek, sum vit skrivaðu týsdagin.

– Hetta rakar eisini nógv av teimum, sum verða løgd undir skurð á sjúkrahúsinum, og tað kann vera alt, frá fólki, sum hava brotið beinið, til fólk, sum hava skorið seg illa í hondina.

Tað rakar eisini fólk, sum hava brúk fyri fysioterapi eftir medisinska viðgerð.

–Nógv av teimum fáa brúk fyri fysioterapi eftir at tey eru útskrivað fyri at fáa førleikan aftur.

– Men nú ber ikki longur til at geva teimum tað á sjúkrahúsinum. Nú mugu vit vísa teimum til tær privatu viðgerðarstovurnar.

– Og har skulu tey sjálvi gjalda helvtina av tí, sum viðgerðn kostar og so rindar sjúkrakassin hina helvtina.

– Men fyri tað fyrsta er tað ikki vist, at teir privatu fysioterapeutarnir raðfesta sjúklingarnar á sama hátt, sum læknarnir vildu raðfest teir.

Og tað er eisini ivasamt, um teir báðir privatu fysioterapeutarnir, sum ikki arbeiða meiri enn hálva tíð, ella gott tað, fáa tikið ímóti stórt fleiri fólkum, enn teir longu nú hava, sigur Bogi Djurhuus.

*Tað er tá ið tær álvarsamu støðurnar taka seg upp, at alt skal virka sum tað eigur, Men ganga tól á Suðuroyar Sjúkrahúsi fyri aftaná vanliga arbeiðstíð, er ongin at gera tey aftur, og vil illa til, kann tað fáa álvarsligar avleiðingar*

# Skuldi einki kosta

*Fyri at sleppa undan uppsagnum, mælti leiðslan á Suðuroyar Sjúkrahúsi til eina loysn, sum ikki hevði kostað landskassanum nakað*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Hvørt einasta starvsfólk, sum verður sagt upp á Suðuroyar Sjúkrahúsi er eitt starvsfólk ov nógv. Tí sjúkrahúsið hevur ikki fleiri fólk enn allarhægst neyðugt.

Bogi Djurhuus, yvirlækni á Suðuroyar Sjúkrahúsi sigur, at leiðslan tí hevur gjørt, hvat hon kundi, fyri at finna konstruktiv uppskot so at sleppast kundi undan sparingum á Suðuroyar Sjúkrahúsi

Og ein loysn, sum leiðslan á Suðuroyar Sjúkrahúsi mælti til, hevði ikki kostað landskassanum eina krónu.

Tey sparitiltøk, sum landsstýrismaðurin í almanna og heilsumálum hevur sett í verk, føra eina sparing uppá 680.000 krónur við sær.



*Helana Dam á Neystabø vildi ikki taka undir við einum uppskotið, sum ikki hevði kostað eina krónu*

Eitt nú skal tann ambulanta fysioterapiin halda uppat. Tvey fólk skulu sigast upp og tað sparir 200.000 krónur.

Eitt hálvt fólk skal sparast í køkini, og tað er ein sparing uppá 150.000 krónur.

Landsstýrismaðurin vil ikki spara meiri í køkini fyri ikki at missa mattænastuna til pensjónistar.

Í leiðbeiningini skal eitt fólk sigast upp, og tað sparir 80.000 í ár, tí talan er um hálvt ára uppsagnartíð.

Og at enda skal ein teknikari sigast upp. Sparing: 200.000 krónur.

Landsstýrismaðurin ger eisini greitt, at laboratoriutænastuni á Vági skal varðveitast.

**Mangla 820.000 krónur**

Tilsamans tørvaði Suðuroyar Sjúkrahús 1,5 millión fyri at kunna varðveita virksemið á sama støði sum í fjør.

Og tá ið hesar 680.000 krónurnar eru spardar, eru sostatt 820.000 krónur eftir at finna, fyri ar sleppa undan enn fleiri uppsagnum.

Men landsstýrismaðurin hevur sett sær fyri at søkja løgtingið um loyvi til at flyta 600.000 krónur frá rakstrinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi, til lønir.

Og Helena Dam á Neystabø hevur biðið umsjónarmannin um at bíða við uppsagnum á seingjadeildini og í ljósmóðurskipanini, til tað er avgreitt.

Men eftir eru so framvegis 220.000 krónur, sum skulu sparast, um onki annað hendir.

Og Helena Dam á Neystabø segði fyri Sosialinum legardagin, at hon fór at royna at finna meiri pening til Suðuroyar Sjúkrahús sum árið líður, hon fekk tó ikki lovað nakað.

**Skuldi onki kosta**

Ístaðin fyri hesar spariætlanirnar, mælti leiðslan á Suðuroyar Sjúkrahúsi til eina loysn, sum ikki hevði ført øktar útreiðslur við sær fyri landskassan.

Tey trý sjúkrahúsini hava fingið eina felags játtan upp á 3,9 milliónir til tól og útgerð.

Leiðslan á Suðuroyar Sjúkrahúsi vísir á, at seinast í fjør, fekk Landssjúkrahúsið eina eykajáttan uppá 5,1 millión til tól og útgerð.

Tí helt leiðslan á Suðuroyar Sjúkrahúsi, at felagsjáttanin uppá 3,9 milliónir í ár toldi at verða skerd nakað. Skotið varð tí upp, at Suðuroyar Sjúkrahús fekk eina millión av teirri játtanini til lønir, og at 500.000 krónur annars blivu fluttar frá rakstrinum til lønir.

Sostatt kundi tann 1,5 milliónin útvegast, sum manglaði í fyri at sleppa undan sparingum á Suðuroyar Sjúkrahúsi- uttan at økja útreiðslurnar hjá landskassanum og uttan at fara út um karmarnar hjá heilsuverkinum.

Men hetta uppskotið vann ikki frama í almanna og heilsumálastýrinum, og tískil vórðu sparingarnar settar í verk - og møguliga verða enn fleiri sparingar settar í verk seinni í ár.



# Føroyingar fáa møguleikan at vinna rúmdarferð

*Danska sjónvarpsrásin TV2 fer at bjóða fólki við í eina kapping um at gerast fyrsti danin í rúmdini. Føroyingar fáa eisini møguleika at verða við í sendingunum, sum føroyski Per Zachariasen framleiðir*

EYÐUN KLAKSTEIN

Fyrsti danin í rumdini kann gerast ein føroyingur.

Gloym alt um Robinsonferðina til eina oynna oyggj, har gerandisligt stríð og grátur er undirhaldið.

Danska sjónvarpsrásin TV2 tilrættaleggur í løtuni eina nýskapandi sendirøð, har endamálið við sendingunum er at finna fram til fyrsta danan, sum verður sendur út í rúmdina.

Føroyski produsarin Per Zachariasen er settur sum produsari av nýggja flaggskipinum hjá TV2, og føroyingar fáa eisini møguleikan at verða við.

- Eg havi alla tíðina lagt dent á, at kappingin skal umfata alt danska kongaríkið, og tí skulu føroyingar og grønlendingar hava møguleikan at verða við, sigur Per Zachariasen.

Einferð í mai ella juni mánaði verða 5000 atgongumerki til sendingarnar settar til sølu, og hetta er í grundini fyrsti parturin av kappingini, tí tey, sum fáa hendur á einum av atgongumerkjunum, sleppa við í kappingina.

**Bara 5000 við**

TV2 ætlar at gera nýtslu av internetinum í sambandi við sendingarnar, og internetið skal eftir øllum at døma eisini tryggja, at føroyingar hava møguleikan at koma við í kappingina.

Tey 5000 hepnu, sum fáa fatur á einum atgongumerki, verða býtt út á tær 10 sendingarnar, sum verða sendar í heyst. Í teimum sendingunum skulu fólkini ígjøgnum ymsar royndir, og í hvørjari sending verður ein vinnari funnin.

Teir 10 vinnararnir sleppa við í eitt finaluumfar, har tey skulu til USA til endaligu royndirnar. Tær verða helst gjørdar á Alabama Space Camp, men enn er hesin partur av sendingini ikki endaliga komin upp á pláss.




*Tekning: Óli Petersen*




**Per Zachariasen skal framleiða nýskapandi sendirøðina hjá danska TV2. Partur av fyrireikingararbeiðnum gekk fyri seg í USA, har hann fylgdi útskjótinigini av rúmdarferjuni Discovery**

Til endans verður funnið fram til tann persónin, sum skal á ferðina 100 kilometrar upp í loft og út í vektloysi sum fyrsti borgarin í danska kongaríkinum nakrantíð.

**Per Zachariasen hevur ábyrgdina**

Men sjálvt um fyrsti danin í rúmdini verður grønlendari, føroyingur ella dani, er føroyski leikluturin í millíónaprojektinum sentralur.

Per Zachariasen er produsari og hevur sostatt ábyrgdina av sjálvari sendingini. Saman við honum arbeiðir ein fíggjarligur leiðari, og teir skulu syrgja fyri, at klárt er at senda 6. oktober í ár.

- Í løtuni sita vit í einum lítlum bólki og leggja sendingarnar til rættis. Hetta er eitt nýskapandi konsept, og tað eru longu fleiri lond, sum hava tryggjað sær rættin til at keypa konseptið frá okkum, sigur Per Zachariasen.

Tað er vanligt, at sjónvarpssendingar gerast verulig søluvøra, um tær eydnast væl í einum landi. Tey, sum koma við einum nýggjum hugskoti til eina sjónvarpssending, eiga eisini rættindini til tað, og tað ber til at vinna pengar burtur úr at selja hesi rættindi.

Tað er TV2, sum hevur biðið Per Zachariasen framleiða “Den store mission”, sum sendingarnar fara at verða róptar, og við avrikunum hjá føroyska produsaranum í huga er tað neyvan løgið, at TV2 valdi hann.

Per Zachariasen var við til uppfinna stóru floksveitsluna, sum eisini hevur verið send í føroyskum sjónvarpi. Hesar sendingar eru tær best eydnaðu undirhaldssendingarnar hjá TV2 nakrantíð.

**Stýra nýggja TV2-flaggskipinum**

Per Zachariasen framleiddi 30 av hesum sendingum, áðrenn hann nú skifti til nýggja flaggskipið hjá TV2.

- Hetta er fyrstu ferð, at eg havi havt so góða tíð at leggja eina sending til rættis. Eg komi at arbeiða við “Den store mission” so at siga fulla tíð fram til oktober mánaða, tá vit fara undir at senda sjálvar sendingar, sigur hann.

- TV2 satsar nógv uppá hesar sendingarnar, og vit vóna sjálvsagt, at tær fara at eydnast væl.

Í sambandi við fyrireikingararbeiðið til “Den store mission” vóru Per Zachariasen og eitt av fólkunum hjá TV2 í USA og fylgdu uppskjótingini av Discovery í fjør.

Men tað verður ikki við nøkrum slíkum kendum rúmdarfari, at fyrsti danin verður sendur út í rúmdina við.

TV2 fer at samstarva við eitt privat amerikanskt felag, sum saman við verkfrøðingum hjá NASA hevur gjørt eitt rúmdarflogfar. Vinnarin av kappingini hjá TV2 verður sendur 100 kilometrar upp í loft við hesum flogfari, og hann sleppur at uppliva vektloysi í nakrar minuttir, áðrenn leiðin aftur verður løgd heim.

Fyrsti danin í rúmdini sleppur hvørki upp á mánan ella í ringrás kring jørðina, men hann kemur út í rúmdina, men ferðin, sum fer at taka tríggjar tímar, fer at gera viðkomandi til fyrsta danska borgaran í rúmdini.

Og kanska hann verður føroyingur.